***Røða Sólvit E. Nolsø setur altjóða hondbóltstevnu Eydnu-Cup, hjá Eydnudeild Føroyar 12.04.22 á skúlanum við Streymin***

Góðu tit øll

So upprann tann stóri dagurin tá tit í Eydnudeildini, við Lundapisunum á odda, kunnu bjóða vælkomin til altjóða stevnuna í hondbólti, **Eydnu-Cup***,* her í stásiliga skúlanum við Streymin.

Og um tveir dagar er 4 ára føðingardagur fyri Eydnudeildina. Ein sólskinssøga, sum tit sanniliga kunnu vera stolt av. Og eitt er vist, allar Føroyar eru stoltar av tykkara ágrýtni, tit hava veruliga gingið undan og slóðað veg. Og væl er komið burturúr.

Við íblástri frá donsk Lykkeligaini byrjaði Morten Hust Petersen saman við øðrum Eydnudeildina í Føroyum. Hetta var tíðliga í 2018. Í fyrsta umfari var venjingin í Kollafirði. Frá at byrja við eini 10 luttakarum, er átakið voksið seg nógv størri og í dag eru venjingar bæði norðuri í Klaksvík, suðuri í Vági, vesturi í Vágunum, eins og í Eysturoynni og í Havn.

Her møtast tit til regluliga til hondbóltsvenjing og tað verður farið ambitiøst til verka við lívligari upphiting og spæli og víðari við at venja bæði at lofta, avlevera og ikki minni at skjóta uppá mál. Tit hava veruliga sett tykkum mál.

Fyrimyndir hava tit sjálvandi og soleiðis sum føroyskur hondbóltur hevur ment seg við árunum, so eru nokk at taka av. Ikki tí, tit hava so sanniliga eisini tykkara fjepparar.

Higani út Føroyum eru tað ikki hissini ambassadørar, sum Eydnudeildin hevur skorað. Heimsmeistanan Jóhan á Plógv Hansen og Elias Ellefsen á Skiparagøtu, sum somuleiðis er millum heimsins bestu spælarar. So verður tað næstan ikki betri. Og jú Havardur Vatnhamar, sum umboðaði Føroyar á Paralympisku leikunum seinasta summar, telist eisini millum teirra.

Á hátíðarhaldi kom eisini viðurkenningin Ársins ítróttarátak 2019 til tykkum í Eydnudeildin Føroya, so flott!

Og til hetta Eydnucup'ið luttaka eisini kenningar uttanfyri landsoddarnar, millum annað kendu Dan Jacobsen saman við Jesper Sørensen, sum báðir eru millum ambassadørarnar í donsku Lykkeligaini.

Saman við teimum koma ikki fleiri enn 300 fólk koma úr Danmark. Tað fevnir um teirra 130 stjørnuleikarar, saman við venjarum, foreldrum og systkjum. Og stovnarin av danska átakinum, Rikke Nielsen, luttekur sjálvandi eisini saman við sínum.

Úr Føroyum luttak tit við ikki minni enn 20 stjørnuspælarum og spennandi verður at fylgja tykkum í kappingini.

Tit løgdu hart út frá byrjan og hava longu luttikið í altjóða kappingum fleiri ferðir, so tær royndirnar hava tit eisini við tykkum. Sum vertir fyri kappingini vita tit tí, hvussu týdningarmikið tað er at vera væl fyrireikaði.

Tí er tað ongin ivi um, at tykkara útlendsku gestir fara at hava nakrar sermerktar dagar her í Føroyum saman við tykkum. Tey eru heppin. Umframt kappingina, so sleppa tey á busstúr at síggja okkara vøkru oyggjar. Og at verða við á tiltaki, har tit hava fingið okkara egnu Bubu og Trølla Pætur at undirhalda. Spennandi upplivingar at fáa heim aftur við.

Tankin aftanfyri tykkara Eydnudeild er eisini, at hetta er eitt tilboð, har øll kunnu taka lut og royna seg, við støði í egnu givnu fortreytum. Endamálið er umframt at røra seg, eisini at hava tað stuttligt saman, og ikki minst at vera saman! Hendan venjing knýtir tykkum saman á ein serligan hátt.

Hetta er eisini tað, sum vit best kenna Eydnudeildina og Lundapisurnar fyri: altíð við einum smíli, og klár at rósa hvørjum øðrum og so tí kenda **HIGH FIVE**. Tit endurspegla altíð gleði og nøgdsemi.

Og tað er einki nýtt í, at samband er millum kropp og sál. Rørsla í sjálvum sær er ikki bara gott fyri likamið og kropsligu orkuna. Tað hevur eisini eina fantastiska jaliga ávirkan á sinnið.

So enn einaferð – eitt sera gott og týdningarmikið tiltak, sum eg virðismeti høgt og ikki minni, at eg varð boðin við. Takk til tykkum øll tit.

Til vores udenlandske gæster: Hjertelig velkommen til vores smukke øer, og vi håber at I nyder opholdet og får gode oplevelser med hjem i bagagen.

Eftir er bert at ynskja okkum øllum eina góða stevnu og eitt gott **Eydnu-Cup**!

**Sólvit E. Nolsø,**
**landsstýrismaður í almannamálum**